# Ímóti minni kvotum

Siumut, sum fyri fyrstu ferð í 30 ár situr í andstøðu í grønlendska Landstinginum, vil ikki taka undir við ætlanini hjá landsstýrinum at skerja fiskikvoturnar. Flokkurin vil heldur ikki ganga við til, at kvoturnar verða ásettar eftir tí, sum fiskifrøðingarnir hava mælt til. Siumut ásannar, at ráevnisvinnan fer at hava altsamt størri týdning fyri tað grønlendska samfelagið í komandi árum, men tað skal ikki kosta fiskimonnunum rættindi, sigur flokkurin. Harafturat krevur Siumut, at myndugleikarnir skulu spyrja seg fyri hjá fiskimonnunum, áðrenn nakrar kvotur verða ásettar.



# Danskur rúsevnabarónur tikin

Í morgin fara nakrir danskir løgreglumenn til Spania eftir Birger de Wett Olsen, sum spanska løgreglan tók í síðstu viku. Donsku myndugleikarnir hava sóknast eftir Birger de Wett Olsen tey seinastu fýra árini, tí hann er skuldsettur fyri at hava smuglað 13 tons av hasji til Danmarkar við einum seglbáti á sumri í 2003. Høvuðsmaðurin aftan fyri smuglingina, Claus Malmqvist, fekk fyri tveimum árum síðani 16 ára fongsul, og danska løgreglan vil vera við, at Birger de Wett Olsen var hansara høgra hond. Løgreglan hevur eisini illgruna um, Birger de Wett Olsen var høvuðsmaður aftan fyri eitt annað smuglaramál, sum snúði seg um 4,7 tons av hasji.

*Á hesi myndini er Silja Star nýggj, men fyri viku síðan var ikki sami dámur umborð. Grót regnaði nevniliga yvir farið*



# Omanlop á Silju Star

**Fyri eini viku síðan datt grót úr Vestmannabjørgunum niður yvir tey 40 fólkini umborð á Silju Star. Ongin fekk mein, og fyriskipararnir geva turki skuldina**

OMANLOP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað er ikki hvønn dag, at oman lop er í ein bát. Men fyri eini viku síðan hendi tað á fyrsta sinni fyri Sea Service, sum í rættiliga nógv ár hevur skipað fyri túrum undir Vestmannabjørgini.

- Meginparturin datt niður innanfyri okkum, men nakrir smáir steinar raktu eisini bátin, sigur Jákup Andrias Lamhauge, sum førdi Silju Star hendan túrin.

Hann sigur eisini, at tað sýnist, at tað er øgiliga nógv grót, men tað hevur kanska ikki verið so nógv. Og at hóast grót regnaði yvir bátin, so vóru fólk rættiliga rólig, men eitt sindur sjokkerað umborð.

### Gevur ein hvøkk

Jákup Andrias Lamhauge leggur afturat, at tílíkar hendingar sjálvandi geva ein hvøkk, men staðfestir, at hetta er fyrsta ferðin, at tað hendir hjá teimum, og hann fegnast, at ongin fekk mein av hendingini.

Hann greiðir somuleiðis frá, at tey høvdu siglt í ein hálvan tíma, tá grótið rapaði yvir skipið.

Um orsøkina til omanlopið á bátin, greiðir Jákup Andrias Lamhauge frá, at tað hevur verið óvanliga turt. Hetta er nakað fjallmenn eisini hava tosað um, tí mann sær, at grótið liggur bert, tí so lítið er vaksið í summar í óvanliga turkinum.

### Altíð vandi

Hinvegin greiðir Jákup Andrias Lamhauge frá, at hann altíð metir tað vera ein ávísan vanda, tá mann fer tílíkar túrar.

- Tað er tað sama, sum at ganga í brattlendi ella at koyra, har tað er høgt. Tað kann altíð okkurt henda. Og tað er eisini soleiðis, at fólk spyrja okkum, um tað er vandamikið, og tá greiða vit frá, at tað ikki er heilt vandaleyst.

### Broytir lítið

Spurdur um fyritøkan fer at broyta túrarnar eftir hendingina, staðfestir Jákup Andrias Lamhauge, at tað helst ikki verður nakað serligt, sum verður broytt eftir hendan túrin.

- Vit kundu siglt longur úti. Men hvat er túrurin tá verdur?, spyr hann.



*Albert fúrsti av Monako kom til Føroya seinnapartin í gjár*
*Mynd: Jóanis Nielsen*

# Albert fúrsti í Føroyum

**Klokkan 17:35 í gjár kom Albert II fúrsti av Monako til Føroya. Hann steðgar ikki so leingi, men fer í dag at hyggja at filmi, sum Ann Andreasen, leiðari av barnaheiminum í Ummannaq, og onnur hava gjørt**

Tá Albert II fúrsti av Monako kom til Føroya í gjár, fór hann beinanvegin at vitja elstu húsini í Sandavági. Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, og Albert Ellefsen, borgarstjóri í Vága kommunu, búðu honum vælkomnum og góvu honum eina føroyska troyggju.

Úr Vágum sigst, at hann var sera vinarligur og fyrikomandi.

Seinni um kvøldið fór hann túr við Norðlýsinum, sum lá á Sandavági. Sluppin legði leiðina undir Hestoynna.

Í dag fer Albert fúrsti av Monako í Norðurlandahúsi, har Ann Andreasen, sum hevur fingið ferðini hjá fúrstanum í lag, er við til at vísa film um barnaheimið í Ummannaq, sum hon hevur leitt seinastu 24 árini.

Hetta er ein sokallað screening, áðrenn filmurin verður vístur á fyrsta sinni í Kanada um eina tíð.

-eij